# Hitin flytur ferðafólk til Føroya

**Turkur, skógareldar og ógvusligur hiti í londunum sunnanfyri fara helst at flyta ferðafólkini norðuryvir í framtíðini.**
**Hjá Smyril Line merkja tey longu hesa gongdina. Nógv fleiri útlendingar eru við Norrönu í summar**




*Strendurnar í Føroyum kunnu um fáa ár verða fyltar av suðureuropearum sum flýggja undan hitanum*

*(savnsmynd)*

FERÐING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Summarferðing:** – Jú, vit merkja heilt greitt til økta áhugan hjá týskarum, fraklendingum og italienarum at vitja Ísland.

– Hetta er ein týðiligur trendur, sum vit í Føroyum eisini fáa ágóðan av, sigur Hendrik Egholm, marknaðarstjóri í Smyril Line.

Fyritøkan er allatíðina til arbeiðis við at marknaðarføra seg og Norrönu í útlondum, og hetta úrslitið sær longu nú út til at geva úrslit.

Í veruleikanum eitt nógv betri úrslit enn væntað:

Norröna hevur í summar verið at kalla fullsett á Danmarkarrutuni. Og ein rættiliga stórur partur av hesum ferðafólkunum eru komin úr suðureuropeiskum londum.

– Vit hava í okkara marknaðarføring júst víst á, at Føroyar eru eitt øðrvísi ferðamál.

– Vit siga teimum, at okkara land er unikt. Og tað er longu líkt til, at fólk hava givið hesum gætur, sigur Hendrik Egholm.

### Hitin hækkar

Veðurgranskarar eru komnir eftir at strendurnar við Miðalhavið kunnu gerast ov heitar fyri norðureuropeisk ferðafólk, orsakað av globalu upphitingini.

Um eini 70 ár koma ferðafólkini í Stórabretlandi og Týsklandi at finna betri klimatisk støð í heimlandinum enn við Miðalhavið, stendur í eini nýggjari frágreiðing.

Hvørt ár vitja um 100 mió fólk úr hesum báðum londunum við Miðalhavið, men longu um fá ár kann broyting koma í.

– Fólk fara ikki longur at leita eftir sól, sjógvi og sandi og síðani verða tvungin at leita sær skugga, orsakað av hita, sigur granskarin, David Viner sum er ein av monnunum aftanfyri frágreiðingina.

Aðrir granskarar vísa á, at um 100 ár kann hitin í heiminum hækka við millum 1,4 og 5,8 stigum.

Hetta ger so aftur tað, at ferðafólk ikki fara at trívast við strendurnar sunnanfyri, men heldur fara at leita sær norðureftir.

# Fyrstu ídnaðarøkini tøk í heyst

**Tað er næstan ikki dagur at ikki Klaksvíkar kommuna fær fyrispurningar um ídnaðarøki til ymisk endamál**

ÍDNAÐUR
*Snorri Brend*



*Stórur áhugi fyri ídnaðarøkjum í Klaksvík*

**Klaksvík:** Fyri Klaksvíkar kommunu hevur tað tí havt stóran týdning at fáa gjørt øki búgvin til hetta, og nú er eitt avgerandi stig tikið í hesum máli.

Kommunan hevur nevniliga gjørt avtalu við Uppsalahagan um keyp av einum 14.000 fermetrar stórum øki sunnanfyri bátahylin í Borðoyarvík.

Her er ætlanin í fyrstu at gera eini átta øki byggibúgvin, men dult verður kortini ikki fyri at møguleiki er fyri enn fleiri økjum.

Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen fegnast um hetta stigið. Við heimasíðuna hjá Klaksvíkar kommunu sigur hann, at økið liggur væl fyri, bæði í mun til sjálvan býin, men eisini við góðum ferðasambandi til restina av landinum.

– Full semja er um, at hetta ídnaðarøkið skal gerast klárt sum skjótast. Ætlanin er, at fyrstu økini skulu latast seinni í ár, sigur borgarstjórin.

Seinnu árini hevur kommunan leigað ella selt eini 10 økir til vinnuvirki í Klingrugarði og á havnarøkinum. Men í løtuni liggja fleiri umsóknir hjá kommununi um onnur byggiloyvi.

## STUTT SAGT

### Forkanningar av nýggjari samferðsluhavn

**Svínoy:** Tey hava leingi tosað um tað og vónað tað, men nú sær út til at okkurt er í umbúna, tá tosað verður um samferðsluhavn í Svínoy.

Landsverk er í løtuni í ferð við at gera forkanningar í samband við at ein nýggj samferðsluhavn møguliga skal gerast á staðnum teir kalla Yviri í Havn.

Hetta seinasta árið hava teir kannað streym- og alduviðurskiftini á staðnum, og í summar eru gjørdar dýpdarmátingar.

Nú verður so farið undir tær numerisku simuleringarnar, og síðani skulu forprosjektið og tilmælið gerast liðug í november mánaði.

**sb**



*Hóast forkanningar nú verða gjørdar av nýggjari samferðsluhavn í Svínoy er ikki vist at ætlanin verður veruleiki*

### Keldan fyllist við tiltøkum

**Skálafjørður:** Hóast samkomuhúsið Keldan verður karmur um Fjarðafestivalin seinni í hesum mánaðinum, so forðar tað kortini ikki fyri øðrum útlendskum vitjanum í samkomuni.

Vikuskiftið undan festivalinum – tað er: dagarnar 18. til 20. august – fær samkoman nevniliga vitjan av bretanum Jonathan Conrathe og einum toymi av fólkum sínum.

Jonathan er stovnari av eini apostólskari tænastu sum ber heitið Valley Ministries, har tey ferðast kring allan heimin og tæna samkomum. Nú standa so Føroyar á skránni.

Undir vitjanini í Kelduni verða møti øll kvøldini. Umframt hetta verður eitt seminar hildið leygardagin.

**sb.**

*Jonathan Conrathe vitjar Føroyar seinni í mánaðinum*

